

# Amerikanskar dreingjareyvir

**Rættiliga seinkað komu All Star United á pallin fríggjakvøldið. Teir vístu seg at vera sera vælegnaðir undirhaldarar. Tónleikaliga var góðskan kanska ikki í topp, men upplivilsið var sera gott. Teir spældu býtt og fingu láturin at runga millum áhoyrararnar**

FJARÐAFESTIVALURIN
Heini S. Kristiansen
heinik@sosialurin.fo

All Star United (ASU) vóru eitt av høvuðsnøvnunum á Fjarðafestivalinum. Teir eru í seinastuni vorðnir kendir í USA. Serliga ein sangur kallaður "Song of the year" er vorðin vælumtóktur. Hann vísti seg eisini at vera nógv tann besti sangurin hjá teimum.

Teir komu á pallin við sjálvsáliti. Teir liva ikki upp til ímyndina av nøkrum sunndagsskúla-fittum kristilgum tónleikarum. Teir eru nakrar ektaðar dreingjareyvir, sum dáma væl at spæla býtt og flippa út. Tó hevði forsangarin eisini ein djúpan vitnisburð mitt í framførsluni og eina bøn til endans. ASU vístu seg sostatt frá nógvum ymiskum síðum fríggjakvøldið.

## High School rokkur

ASU hava ein stíl, sum minnir um tann amerikanska High-School rokkin. Teir fýra limirnir eru nakrar veruligar dreingjareyvir, sum veruliga duga at undirhalda við øðrum enn tónleiki. Teir spældu hund við hvørjum øðrum, og forsangarin nýtti hvørt høvi til at arga Michael Tait, sum kom á pallin leygardagin. Hann vísti á, at teir báðir kennast væl, og hann segði alt einans til stuttleikar.
Áhoyrararnir dámdu væl alt fjasi frá pallinum, hóast teir kanska høvdu trupult við at skilja flata skemtið.

Tempo-fylti rokkurin ger okkurt við teg, og forsangarin dugdi væl at geva lív til sangirnar. Hann speladi runt á pallinum, og tú gjørdist næstan móður bara við at hyggja at honum. Serliga sangurin "Song of the year" er fangandi, og tað vóru nógv, sum sungu við til lagið. Tað lagið er eisini nógv tað kendasta hjá teimum. Tað er eitt sovorðið lag, sum tú ikki kanst fáa úr høvdinum aftur, og tú murrar tað alla tíðina.

Hini løgini vóru ikki so góð tónlistarliga, og tí kanst tú siga, at konsertin náddi sítt hæddarpunkt við "Song of the year".

## Skemtiligir men álvarsamir

Forsangarin syngur ikki framúrskarandi, men hann hevur aðrar sera góðar eginleikar. Í støðum var tað eitt sindur falskt, tá ið teir sungu fleirraddað. Men teir skulu eiga tað, at teir fingu lív í fjøldina, og konsertin var væl eydnað.

Hóast teir at síggja til vóru óseriøsir og skemtiligir, so vístu teir eisini eina meira álvarsama síðu, tá ið teir nýttu møguleikan at vitna um teirra trúgv. Sum heild var tað ein góð konsert, sum rokkaði.

Forsangarin Ian greiddi eftir konsertina Planet.fo frá, at teir hava hugnað sær í Føroyum. Hann hevur ongantíð spælt eina konsert, har ið hann hevur sæð ein flottan foss í bakgrundini, sigur hann flennandi. Teir fóru beinleiðis vestur til Vágar eftir konsertina, tí at teir skuldu flúgva longu leygarmorgunin. Ian segði, at teir longdust heim, tí at nú hava teir verið á konsertferð í Evropa í nógvar vikur.



*Forsangarin hjá All Star United, Ian, er ein góður fronfigurur hjá bólkinum. Teir vóru ógvuliga "casual" á pallinum, og tað var fleiri ferðir, at láturin rungaði eftir teirra dreingjalótum.*

*Mynd. Álvur Haraldsen*

# Nimrod:

## Boðskapurin er hin sami



*Nimrod og Eyðun syngja sama lag, men stílarnir eru ymiskir*

**Nimrod Midjord úr Lopra hevur sungið nógv á møtum og til onnur kristilig tiltøk. Hann var eisini komin á Fjarðafestivalin at lurta eftir øðrum sangarum við sama boðskapi sum hann.**

VITJANDI
Snorri Brend

Tey seinastu átta árini hevur Nimrod verið nógv at hoyrt til kristilig tiltøk, - serliga í Suðuroynni. Hann er formaður í missiónshúsinum í Sumba og er tí virkin í hesum húsinum. Umframt hetta eru hann og konan, Ebba ofta og syngja á møtum við guittara sínum.
Men fríggjadagin fór Nimrod norðureftir og legði leiðina inn á Skálafjørðin. Nú ynskti hann bert at vera áhoyrari – lurta eftir tí, sum hini høvdu at bera fram.
- Einki er so gott sum at syngja um Jesus. So kann stílurin vera so ymiskur, men boðskapurin er kortini hin sami, sigur Nimrod avgjørdur.
Fyri Nimrod hevur tað verið ein góð uppliving at koma á Fjarðafestivalin. Hann vónar tí, at hann verður aftur komandi ár.
- Hetta er serliga gott fyri ungdómin. Og eg haldi eisini, at hetta er eitt gott alternativ til teir verðsligu festivalarnar, sigur Nimrod.
Sjálvur hevur honum dámað best at hoyrt Ekklesia, Vitan og Heina Lützen.
- Og Eyðun Jacobsen dámdi mær eisini sera væl. Hann hevði ein góðan boðskap, sigur Nimrod.
Eftir konsertina fekk hann eisini høvið at skifta orð við Eyðun. Jú, stílar teirra eru ymiskir. Men tá teir framføra, syngja teir sama lag!